# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Ólavur Samson 60 ár

Í morgin, fríggjadagin 2. desember, verður Ólavur Samson í Klaksvík 60 ár. Ólavur hoyrir til býarmyndina í Klaksvík, og kanska komast fleiri við navnið, tí tað er ikki so langt síðani, at hann eitt leygarkvøld var gestur hjá Gunnari Nolsøe í Útvarpinum.

Ólavur er ættaður av Stongunum. Foreldrini vóru Jákup Samson, sum var ættaður av Vágsheygnum, og Jacobina, sum var úr Gerðum. Hon var dóttir Óla klokker, sum hann varð nevndur. Harvið var mamma Ólav systir eitt nú Kjølbro og Dáva úr Gerðum. Tey vóru tveir brøður og fýra systrar. Hon var yngst av systkjunum, og tá ið Ólavur er yngstur í sínum systkinaflokki, so ber tað við sær, at hann er yngstur av systkinabørnunum á móður síðuni.

Jacobina og Jákup Samson fingu fimm børn: Jona, Lilly, Edith, Samson og Ólavur. Jona, sum doyði fyri nøkrum árum síðani, og Ólavur búsettust í Klaksvík. Lilly býr í Keypmannahavn, Edith í Søldarfirði og Samson á Viðareiði.

Ólavur var miðskeiðis í seksti árunum avlærdur maskinsmiðjur í smiðjuni hjá pápanum. Í 1970 leyk hann maskinmeistaraprógv í Keypmannahavn, og so var hann í tíggju ár smiðjumeistari í familjufyritøkuni. Tá ið hann fekk starv sum sýnsmaður hjá Tryggingarsambandinum Føroyar gavst hann við smiðjuni. Ólavur var í føstum starvi hjá Tryggingini inntil í summar. Nú er hann freelance sýnsmaður hjá Tryggingarfelagnum Føroyar.

Í frítíðini hevur Ólavur verið tenorur í Emmaus kórinum og í Klaksvíkar Sangfelag, og tey seinastu árini hevur hann verið klokkari í Christianskirkjuni. Harvið hevur hann tikið arvin uppaftur eftir abban, Óla klokker. Ólavur er presidentur í føroyska blóðgevarafelagnum, hann er ein av trúgvu KÍ stuðlunum, honum dámar væl at krokkast í skúlagarðinum, og so hevur honum dámað sera væl at fáast við seyð. Hann er ognari á Uppsølum, har hann er ein av røktingarmonnunum, og á Skálatoftum, har hann hevur verið fjalmaður, og í 35 ár hevur hann gingið á fjall hjá sváginum, sum er bóndi í Gerðum.



Ólavur hevur lagt seg nógv eftir at gera tað lagaligari bæði hjá fjalmonnunum og seyðinum. Hann hevur verið hendinga góður í hesum, taka teir til, sum hava verið saman við honum í hesum høpinum. Eitt nú syrgdi Ólavur fyri meiri enn tredivu árum síðani fyri, at tað bar til at sleppa undan at binda seyðin niður, tá ið teir vóru á fjalli. Hann gjørdi grabbar, sum seyðurin stendur í, tá ið teir lossa hann niður í bátin.

Ólavur giftist í 1974 við Elinborg, sum er dóttur Onnu, ið var úr Nornastovu í Mikladali, og Jógvan Martin Joensen, sum var bóndi í Niðristovu í Gerðum. Á kyndilsmessu fylti Elinborg 55 ár. Hon hevur í 40 ár verið í frisøryrkinum, og tað er framvegis nógv ferðsla í salongini í Gerðum.

Elinborg og Ólavur eiga hugnaligt heim á Biskupsstøð, har tey búgva saman við synunum. Teir eru Jákup føddur í 1981, Jógvan føddur í 1983 og Ari føddur í 1989.

Føðingardagurin verður hildin í Skálanum, har øll eru væl komin til ræst kjøt og súpan fríggjakvøldið klokkan 19.

**J**

---

Ivan Simonsen, Tórshavn:

## 25 ára starvsdag hjá Føroya Tele

Hósdagin 1. desember hevur Ivan Simonsen í Havn 25 ára starvsdag hjá Føroya Tele.

Ivan er 53 ára gamal og sørvingur. Eftir lokið studentsprógv í 1972 fór hann til Danmarkar at lesa til verkfrøðing. Tá útbúgvingin varð liðug, arbeiddi hann í tvey ár í Danmark sum verkfrøðingur innan sjúkrahústøkni hjá EMI Medical.

Í 1980 kom hann heim aftur til Føroya, og 1. des. fekk hann starv sum verkfrøðingur hjá Telefonverki Føroya Løgtings, sum stovnurin æt tá. Stutt eftir varð hann settur sum deildarleiðari á kaðaldeildini, har hann var í fleiri ár.

Ivan hevur saman við øðrum verið við í stóru tøkniligu menningini á stovninum. Hann var m.a. við til at innføra telefaxið, sum fyrstu tíðina einans var á telefonstøðum og posthúsum. Eisini var hann við til at seta á stovn fyrsta føroyska talgilda sentralin í Føroyum. Hann var eisini við til at stovna internetið hjá Føroya Tele, betri kent sum Olivant, og Dankort skipanirnar við gjaldskort-terminalum.



Annars hevur Ivan arbeitt mest við vinnuproduktum, sum t.d. menning av nýggjari tøkni og telefoniskipanum til vinnukundar.

Fyri kortum var Ivan fluttur til nýggju "Produkt Managment" deildina, sum hoyrir undir FT-samskifti, har hann hevur ábyrgdina av ymiskum nýggjum produktum.

Ivan, ið hevur badminton sum frítíðarítriv, er giftur Sólvør, f. Hentze, sum eisini er úr Sørvági. Tey eiga tvey børn: Rúni 33 ár, sum býr í Tórshavn og Randi 27 ár, ið lesur til lækna í Odense. Ivan eigur eisini eina 2 ára gamla abbadóttir, ið eitur Rúna Maria.

---

†

## Andlát og jarðarferðir

Mánakvøldið 28. november andaðust í heiminum í Sørvági **Marin Sofía Weihe**, ættað úr Norðragøtu, 85 ára gomul og **Hermod Weihe**, 56 ára gamal.

Bønarhald verður í Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin 2. desember klokkan 16.00. Jarðarferðin verður úr Sørvágs kirkju leygardagin 3. desember klokkan 14.00. Sungið verður úr sálmabókini.

Tey ið vilja minnast Sofíu og Hermod kunnu lata eina peningagávu til Missiónshúsið í Sørvági, konto í Føroya Banka.

**Hanna Klein** frá Gjógv andaðist á Eysturoyar Røktar- og Ellisheimi týsdagin 29. november, 86 ára gomul. Kistan fer av Røktarheiminum í Runavík fríggjadagin klokkan 17. Jarðarferðin verður úr Gjáar kirkju leygardagin klokkan 13.

Tey, ið vilja minnast Hannu á Rætt, kunnu lata Gjáar kirkju eina peningagávu, konta í peningastovnunum.

**Karl Thorleif Olsen**, Tórshavn, andaðist í heiminum mánadagin 29. november, 81 ára gamal.

**Gardar Høgnesen**, Klaksvík, andaðist í heiminum mánamorgunin 28. novmber, 46 ára gamal. Kistan fer av kapellinum á Klaksvíkar Sjúkrahúsi mikukvøldið klokkan 18 heim í Christianskirkjuna.

Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13:30.

Tey, ið vilja minnast Gardar kunnu lata Emmaus eina peningagávu. Konto í Norðoya Sparikassa.

---

†

Kunngjørt verður fyri ætt, vinum og kenningum, at kæri pápi, verpápi, abbi, langabbi og beiggi okkara

**Carl Torleif Olsen**

Tórshavn

andaðist týsdagin 29. november 81 ára gamal.

Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin kl. 13.00 .

*Familjunnar vegna*
**Frants, Eileen og Mia**

---

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum tykkum, sum á ymiskan hátt hjálptu til við jarðarferðina hjá okkara kæra pápa og bróður

**Sámuel Kristian Gunrim**

Eisini ein hjartans tøkk fyri gávur til Sumbiar kirkju.

*Familjunnar vegna*
**Michael, Marlena og systrarnar**